Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Húsarhaldsskúli Føroya

Spurningur:

Hví er spakin ikki settur í enn til nýggja Húsarhaldsskúla Føroya ?

Viðmerkingar:

Tann 6. apríl 2022 spurdi eg sum ófráboðaðan fyrispurning landsstýrismannin Jenis av Rana, nær spakin fór at blíva settur í til nýggja Húsarhaldsskúla Føroya. Landsstýrismaðurin upplýsti tá, at spakin bleiv settur í skjótt. Væntandi um nakrar vikur. Nøkur skjøl skuldu fyrst eftirhyggjast og tryggjast skuldi, at alt var í lagi, áðrenn byggingin fór í gongd. Sambært landsstýrismanninum sjálvum skuldi hetta ikki tikið langa tíð.

Nú eru longu 7 vikur farnar, síðan landsstýrismaðurin segði hetta, men enn er ongin spaki settur í. Tí er spurningurin, hvørjum bíðað verður eftir.

Á Løgtingi, 25. mai 2022

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur